**Danski tung málms bólkurin Whelm við føroyska oddamanninum Atla Brix Kamban hevur á fyrstu fløgu síni The Prologue skapt eina myrka og inniliga ljóðmynd.**

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo




# Myrkt og inniligt

Tað var ikki við sørt av spenningi, at eg legði fløguna The Prologue hjá Whelm í fløguspælaran, í tíðindaskrivinum um fløguna, skrivar bólkurin m.a. at tónleikurin er sprottin úr tónleikagreinum sum dómsmálmi, móru, deyðsmálmi, niðumálmi og postrokki. Eitt bland, ið bólkurin sjálvur sigur vera ringt at seta í bás og sum ikki verður stýrt av vanligum reglum. Hetta ljóðar spennandi og tá bólkurin samstundis hevur føroyskan sangara í Atla Brix Kamban, so var hetta ein fløga, ið skuldi kannast.

## Myrkt og inniligt

Tónleikurin á teimum báðu fyrstu løgunum Structure og A State Of Decay, liggur ivaleyst mest í dómsmálms tónleikagreinini, og hevur hesa eyðkendu dómadagskensluna. Løgini ganga sera spakuliga í hesi tónleikagrein, og tykjast á onkran hátt øll at hava beinleiðis ávísing aftur til lagið Black Sabbath, av fyrstu útgávuni hjá Black Sabbath, ið eisini æt Black Sabbath.

Soleiðis er eisini við fyrstu løgunum hjá Whelm. Hetta ómetaliga tunga, myrka og inniliga er reyði tráðurin á fløguni.

Sjálvt triðja lagið á fløguni, instrumentala lagið Enter, ið er væl lívligari enn bæði fyrru løgini, hevur eina myrka dapra dómadagskenslu. Tó brýtur seinasta lagið The Passing nakað frá hinum, og er munandi lívligari. Hetta er samstundis eisini mest áhugaverda lagið á fløguni.

## Vilja bróta múrar

Bólkurin sigur sjálvur, at hann ikki vil vera stýrdur av vanligum reglum, men í staðin brýtur niður teir tónlistarligu garðar, ið royna at stýra tónleikinum. Hetta sæst sanniliga eisini aftur á fløguni, tó kanska ikki á tann hátt, sum bólkurin hevði ætlað tað. Serliga er tað longdin á løgunum: Structure 10 minuttir, A State Of Decay 10.59 minuttir, Enter 4.52 minuttir og The Passing 7.28 minuttir, ið sigur sína egnu søgu.

## Tungt at koma í gjøgnum

Serliga lagið Structure tykist tungt at koma í gjøgnum. Einki hendur í lagnum fyrr enn tveir minuttir eru farnir, og tað tykist sera langdrigið. Vandi er nokk fyri, at sera fá fólk tíma at lurta víðari. Lagið er nógv tað veikasta lagið á fløguni á allan hátt. Melodilinjan hevur lítið upp á seg og passar illa til tónleikin, ið er øgiliga monotonur, at gera eitt lag, sum hevur so lítið uppá seg og er 10 minuttir, er sjálvandi nýskapandi, men gott er tað ikki. Tað versta við lagnum er uttan iva teksturin, sum mest tykist sum fjasutt lummaspeki. Tað er Mikkel Putzek, ið eigur orðini, og hann hugsar eftir øllum at døma nógv um stóru loyndarmálini her í lívinum. Sangurin handlar um hesa leitan eftir svarum og umframt at vera rættiliga illa skrivaður tykist innihaldið dekan ov pubertetskent. Putzek hevur eisini skrivað orðini í The Passing, og hóast tey eru munandi betur skrivaði, er hendan leitanin eisini til staðar, og hon telur niður fyri heildina í tí lagnum.

## Atla'sa partur liggur ikki eftir

Harafturímóti vísir teksturin hjá Atla Brix Kamban til lagið State Of Decay, at her er talan um ein mann við góðum skaldagávum. Hann ferðast væl í enska málinum og spælir sær við orð á høgum støði.

Atli hevur eina fína rødd til hetta slagið av tónleiki og rópar, brølar og grovlar væl, og tað ljóðar sum hann meinar tað. Eisini bólkurin spælir væl og inniligt, men sjálvt tey betru løgini á fløguni eru bert miðal hampa. Bólkurin hevur nøkur góð hugskot, men vónandi fer hann at arbeiða væl og leingi við tónleikinum, áðrenn ein heil fløga verður spæld inn.

**Um The Prologue við Whelm**

Structure 10
A State Of Decay 10.59
Enter 4.52
og The Passing 7.28